# ARBEIÐSBLAÐ 3
## LEIKRIT

Tit skulu nú skriva leikritið til tykkara ræðusenu.

Gerið eitt einfalt leikrit á í **mesta lagið 3 síður**, sum inniheldur í **mesta lagið 3 orðaskifti**. Eitt orðaskifti (replik) er ein setningur ella eitt orð, ið er partur av samtalu, kjaki ella líknandi. Eitt orðaskifti kann ofta vera tað, ið sagt verður tá okkurt hendir, t.d. ”Er nakar her?”.

Brúkið arbeiðsblaðið og fyrstu síðu í leikritinum frá ‘I dare you’ sum íblástur.

Tit skulu savna høvuðspersónin, skrímslið og location í einari senu.

### HER ER EIN UPPSKRIVT UPP Á EIN RÆÐUFILM, TIL ÍBLÁSTURS:

- *BYRJANIN:* Lær høvuðspersónin at kenna, umhvørvið og staðið. Okkurt ’creepy’ byrjar at henda.
- *MIÐJAN: Tað gerst meira og meira óhugnaligt, skrímslið kemur til sjóndar. Tað koma fleiri hvøkkir upp til klimaks, har tað er nívandi og óhugnaligt.*
- *ENDIN:* Hvussu loysa høvuðspersónurin og skrímslið hesa støðuna? Og hvussu hvørvur skrímslið? Ella hvørvur tað ... ?

Tit skulu eisini leggja til rættis, hvussu tit vilja arbeiða við suspense, surprise, ljóði og ljósi undir upptøkunum. Lesið leikrit tykkara upp fyri flokkinum og læraranum.

Góða eydnu.



***PREI OG HUGSKOT***

### LURTIÐ EFTIR KRITIKKI OG RÁÐUM

- Hvørjar vóru reaktiónirnar tá tit greiddu hinum frá um høvuðspersónin og skrímslið?
- Hvat søgdu tey í sambandi við at tit løgdu orðsskiftini/replikkirnar fram?
- Hvat hildu tey um leikritið?
- Hvussu kunnu tit brúka afturmeldingarnar, sum tit hava fingið?

**VALFRÍ UPPGÁVA:**
Um tit hava stundir, so kunnu tit gera eitt 'storyboard', ið lýsir senuna.

Eitt 'storyboard' er tekningar sum vísa, hvussu tit vilja hava tykkara filmsupptøkur at síggja út. Tað er eitt stak gott arbeiðsamboð, tá tit skulu út at gera upptøkur.

**VALFRÍ UPPGÁVA:**
Um tit hava stundir, so kunnu tit hugsa um, hvussu tit filmiskt vilja skapa tykkara skrímsl?

Eru tað serlig perspektiv, skeringar, ljós, ljóð o.s.fr., sum kann stuðla eyðkennunum hjá tykkara skrímsli?